# Stigini telja




*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR** Neistin fekk bæði stigini og rennur framvegis aftaná ovastu liðunum. Tað var tað, sum var mest umráðandi hesaferð

Uni Holm Johannesen

Neistin greiddi sína skyldu og fekk bæði stigini.

Tað var fremst av øllum tað, sum taldi hjá Neistanum.

At spælið var ikki so sannførandi í løtum er so nakað, sum venjarin helst fer at hugsa um næstu vikuna.

Neistin vann við seks málum, 25-19.

### Nógv mistøk

Dysturin var nógv merktur av mistøkum. Tað var lítil ferð á spælinum fyrstu løtuna, og serliga dugdi heimaliðið illa at gagnnýta upplagdu málmøguleikarnar.

VB var á odda fyrstu løtuna, men brádliga fingu kvinnurnar úr Vági ikki mál í sjey minuttir, og Neistin fekk seks mál. VB hótti ongantíð leiðsluna hjá Neistanum.

### Brauer aftur toppskjútti

Barbara Brauer var aftur toppskjútti hjá Neistanum um vikuskiftið.

Hon hevur verið ein sannur fongur hjá høvuðsstaðarliðnum. Hvørt vikuskiftið gongur Brauer á odda.

Hon hevur sjálvandi verið ein stórur fyrimunur hjá Neistanum. Men leygardagin var álopsspælið ov bundið av henni. Tað kann verða ein vansi í øðrum dystum, tá Brauer er minni væl uppløgd, at hinar kunnu ikki taka ábyrgd.

Uppspælið er ov ofta, at Brauer skal skjóta, og higartil hevur tað eydnast væl. Men um liðið bara hevur eina loysn, verður tað helst ein trupulleiki fyrr ella seinni.

*uni@sosialurin.fo*

# Christophersen í hopla

**HONDBÓLTUR** Durita Christophersen skeyt heili 18 mál, tá Stjørnan vann lætt og einfalt á botnliðnum

Uni Holm Johannesen

Durita Christophersen hevur aftur og aftur prógvað, at hon er millum fremstu hondbóltsleikararnar í landinum.

Landsliðsleikarin hevur fingið ítøkilig tilboð og fyrispurningar frá fleiri útlendsku feløgum, men hon hevur framvegis ikki tikið av.

Hóast Stjørnan ikki fer at seta fót fyri henni, um hon ætlar sær uttanlands, so frøast klaksvíkingar um, at vestmennagentan framvegis spælir í Føroyum.

Christophersen skeyt heili 18 av teimum 37 málunum, sum Stjørnan fekk í gjár.

### Avgreiðsluspurningur

Stjørnan vann heili 37-17.

Kvinnurnar úr Klaksvík spældu við fullari megi frá byrjan og fóru ongantíð niður í ferð.

Avbjóðingin hjá gestunum av Skálafjørðinum var so at siga bara at hóra undan sum frægast. Tær sluppu hinvegin ikki serliga væl frá uppgávuni, tí munurin var sera stórur.

Rebekka Justinussen, sum hevur verið lyklaleikarin hjá StÍF í ár, var ikki við vegna skaða. Tað merkist sjálvsagt.

### Kanska ein vansi

Stjørnan spældi meira ella minni ein læттan venjingardyst í gjár. Tað kann kanska vera ein vansi fyri greipuvinnararnar. Stjørnan skal ikki spæla næsta vikuskiftið. Næsti dystur er í Runavík móti Tjaldinum tann 18. desember.

At kvinnurnar úr Klaksvík ikki sluppu at kýta seg av álvara undan stórdystinum um tvær vikur verður kanska ein vansi. Tá eru tríggjar vikur síðan, at tær av álvara fingu seg royndar. Í samfullar 21 dagar er nærmast bara venjing á skránni hjá Stjørnuni.

Tjaldur spælir móti Kyndil næsta vikuskiftið.

*uni@sosialurin.fo*

# Fjórði sigurin upp í slag

**HONDBÓLTUR** Venjaraskiftið hjá Tjaldur hevur riggað væl. Kvinnurnar úr Runavík hava nú vunnið fýra ferðir upp í slag

Uni Holm Johannesen

Neistin, VB, StÍF og nú VÍF.

Átta stig av átta møguligum er úrtøkan hjá Tjaldri, síðan Trygvi Mortensen setti seg í venjarasessin.

Pílurin peikar beint upp eftir hjá kvinnunum úr Runavík, sum hava beina kós móti finaluni um føroyameistaraheitið.

### Munur beinanveg

Adina Petrea gekk fremst, tá Tjaldur fór til stroks í Vestmanna.

Gestirnir vóru á odda 7-2 miðskeiðis í fyrra hálvleiki, og so var spenningurin horvin.

Hóast Tjaldur vóru á sigurskós, so fóru tað ongantíð niður í leikferð.

Adrina Petrea var toppskjútti við 12 málum.

## **VÍF – Tjaldur** 20-28 (8-14)

Høllin í Vestmanna

Dómarar: Karstin Joensen og Kristian Joensen

**10 min.: 2-4**
**20 min.: 4-10**
**40 min.: 12-18**
**50 min.: 15-24**

**VÍF:** Liljan Djurhuus 7, Agnas Olsen 5, Halla Durhuus 3, Rógvi Joensen 3, Elisa Leo 2.
**Tjaldur:** Adina Petrea 12, Cormelia Rimbu 5, Annika Thomsen 3, Simona Petersen 3, Jóhanna í Króki 2, Sarah Ann Thomsen 2, Benadikta Johannesen 1.
Útvísingar: VÍF 2 – Tjaldur 2

## **Stjørnan – StÍF** 37-17 (18-7)

KÍ-høllin, Klaksvík

Dómarar: Ragnar Simonsen og Rúni Mohr

**10 min.: 7-2**
**20 min.: 13-4**
**40 min.: 22-10**
**50 min.: 30-15**

**Stjørnan:** Durita Christophersen 18, Una Olsen 3, Nicoletta Radu Hansen 3, Edith Hansen 3, Durita Mikkelsen 2, Ella Petersen 2, Bára S. Klakstein 2, Elsba Rasmussen 2, Valentina Suciu 1, Judit Hansen 1.
**StÍF:** Fríarun Danielsen 8, Birita Poulsen 4, Birna T. Johannesen 2, Oddrún Danielsen 1, Bára Berthelsen 1, Lilja Gregersen 1.
Útvísingar: Stjørnan 2 StÍF 1

## **Neistin – VB** 25-19 (12-10)

Høllin á Hálsi, Tórshavn

Dómarar: Karstin Joensen og Kristian Joensen

**10 min.: 3-6**
**20 min.: 5-8**
**40 min.: 18-12**
**50 min.: 20-15**

**Neistin:** Barbara Brauer 8, Jacklin Durhuus 3, Birita Wardum 3, Bára Hansen 3, Rakul Magnussen 3, Marjun Danberg 2, Elin Holm 2, Katrin á Neystabø 1.
**VB:** Una Egilsdóttir 5, Gurið K. Mortensen 5, Bára K. Mortensen 4, Gintare Lydekaite 2, Andrea Nielsen 2, Rannvá Johannesen 1.
Útvísingar: Neistin 5 VB 4

## **Sunset Deildin** *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 11 | 335 | 256 | 79 | 20 |
| 2 | Tjaldur | 10 | 278 | 220 | 58 | 15 |
| 3 | Neistin | 10 | 274 | 242 | 32 | 15 |
| 4 | Kyndil | 10 | 247 | 228 | 19 | 10 |
| 5 | VB | 10 | 243 | 265 | -22 | 7 |
| 6 | VÍF | 11 | 258 | 315 | -57 | 4 |
| 7 | StÍF | 10 | 194 | 303 | -109 | 1 |